Sosialurin

Nr. 219 - 12. november 2007

# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Naser Khader er væl umtóktur millum fólk, men tað er ikki nóg mikið hjá einum floksformanni (Troels Mylenberg, viðmerkjari)*

# Juan Carlos bað Chavez halda kjaft

**Tað er ikki á hvørjum degi, at ein kongur biður ein forseta halda kjaft, meðan onnur hoyra, men um vikuskiftið misti spanski kongurin tolið við forsetanum í Venesuela**

*Juan Carlos kongur á veg úr fundarhølinum*





*Hugo Chavez breyt spanska forsætisráðharran av alla tíðina, til øði kom í kongin*

Juan Carlos kongur og Hugo Chavez, forseti, vóru millum luttakararnar á einari ráðstevnu fyri ríkis- og stjórnarleiðararnar í teimum latínamerikonsku londunum, Spania og Portugal.

Allir høvdu orðið, og venesuelski forsetin, sum ikki júst er kendur fyri at vanda sær um orðini, brúkti ein part av sínari røðu til at finnast hvassliga at fyrrverandi spanska forsætisráðharranum José María Aznar, sum hann umrøddi sum fasist.

Núverandi spanski stjórnarleiðarin, Jose Luis Rodriguez Zapatero, royndi at verja sín undanmann, men Chavez hevði í heilum hondina á lofti og royndi at bróta hann av. Tað fekk at enda øði í Juan Carlos kong.

-Hví heldur tú ikki kjaft? spurdi kongur og vendi sær ímóti venesuelska forsetanum. So reistist hann og rýmdi úr fundarhølinum.

# Færri doyggja av landminum

**Altsamt færri fólk doyggja ella fáa skaða av fjaldum landminum**

Higartil í ár eru 5.751 fólk vorðin offur fyri landminum, og tað er 16 prosent færri enn í fjør.

Hóast talið minkar, eru landminurnar framvegis ein sera stórur vandi fyri fólk í fleiri londum, og í Pakistan, Myanmar, Somalia og Libanon velsur talið á teimum, sum doyggja ella fáa skaða av landminum. Í teimum flestu førunum er talan um sivilfólk, og minst ein triðingur av teimum raktu eru børn.

ST metir, at 473.000 fólk kring heimin hava fingið varandi skaða av landminum.

# Skrivað bók um Madeleine

**Tveir kendir portugisiskir tíðindamenn hava skrivað erina bók um Madeleine-málið**

Í bókini, sum hevur fingið heitið "Madeleine 129", seta Hernani Cavalho og Luis Maria 129 ymsar spurningar, sum allir hava samband við málið um ta horvnu ensku gentuna, og sum hava verið frammi í fjølmiðlunum teir seinastu mánaðarnar.

Millum annað seta teir báðir spurningin, hvussu nógv Gerry og Kate McCann og vinfólk teirra drukku tað kvøldið, Madeleine hvarv. Undir teimum fyrstu avhoyringunum søgdu hjúnini, at tey drukku bara hvítvín í íbúðini, eftir at børnini vóru farin til songar. Aðrar keldur hava greitt frá, at hjúnini og vinfólk teirra drukku minst fýra fløskur av víni á matstovuni, og okkurt vitni vil vera við, at tey drukku 14 fløskur har.

## STUTT SAGT

### Hillary fær egnar spurningar

Amerikanskir fjømiðlar vilja vera við, at tá Hillary Clinton heldur røðu á veljarafundum, eru tað hennara egnu hjálparfólk, sum siga áhoyrarunum, hvat tey skulu spyrja hana um. Ein maður, sum var á einum veljarafundi hjá Hillary Clinton, sigur, at hann varð biðin um at seta henni ein spurning um um hennara áskoðan á Irak-kríggið, og maðurin ivast ikki í, at Hillary Clinton hevði biðið um at fáa tann spurningin. Eitt av hjálparfólkum hennara viðgekk seinasta fríggjadag, at hann hevði biðið áhoyrarar á einum veljarafundi í Iowa seta spurningar, sum Hillary Clinton hevði biðið um at fáa.

### Howard kann tapa

Eru veljarakanningarnar eftirfarandi, noyðist avstralski forsætisráðharrin, John Howard, at leggja frá sær aftan á valið, sum verður tann 24. novembur. Tann seinasta kanningin, sum blaðið The Australian almannakunngjørdi í morgun, vísir, at tann konservativi flokkurin hjá Howard fer at fáa 45 prosent av atkvøðunum, og at arbeiðaraflokkurin fer at fáa 55 prosent. Kanningin vísir, at stjórnarflokkurin hevur mist nógvar veljarar í seinastuni, og orsøkin sigst vera, at tjóðbankin júst hevur hækkað rentuna fyri sættu ferð, síðani John Howard kom til valdið í 1996. Eirr av hansara vallyftum tá var at halda rentuni niðri.

### Verkfall í Hollywood

Leygardagin sloknaðu ljósini í fleiri leikhúsum á tí kenda Broadway í New York, tí tey, sum arbeiða við pallunum, fóru í verkfall við kravi um meiri løn. Verkfallið rakar eisini upptøkuhølini í Hollywood. Partarnir hava tingast síðani í juni, men uttan úrslit. Í Hollywood eru leikritahøvundarnir eisini farnir í verkfall. Teir vilja hava samsýning fyri, at teirra leikrit verða brúkt á internetinum, og eygleiðarar siga, ay hetta verkfallið kann lættliga vara fleiri mánaðir.